FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-112_1.2
dags. 20-10-2010

Heilsufrøðiliga starvsstovan
Att: Laila Jacobsen, deildarleiðari

lailajac hsf.fo

Viðv.: Hoyringssskriv um stýring av sjógóðsku

Felagið hevur móttikið skriv tygara 29-09-2010 og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 19-10-2010.

Felagið metir ikki, at nevndu ásetingarnar í matvørulógini beinleiðis eiga at ávirka stýringina av spillivatni í kommununum. Hetta tí talan er um krøv til fyritøkur og at stýringin av spillivatni í kommununum verður stýrd í aðrari lóggávu.

Kravið er at kommunalar spillivatnsskipanir skulu verða lidnar í 2015.

Matvørulógin – krøv til fyritøkuna
Framleiðarar, ið framleiða matvørur, skulu fylgja matvørulógini. Hesir hava m.a. ábyrgd av vatngóðsku, samb. § 2 í matvørulógini, at tryggja hesa frá tí staði har rávatn verður tikið inn.

Hettar verður útdýpa í § 10, 3. punkt í kunngerðini um innaneftirlit, har fyritøkan verður ásett at stýra vatngóðskuni á fyritøkuni. Í § 11, b, verður eisini kravt, at fyritøkan skal hava eftirlit við og góðkennina móttiknar rávørur, t.d. fisk, um hesar er í lagi.

Krøvini í matvørulógini eru rættað til framleiðaran ella fyritøkuna, sum, í hesum serstaka førinum, framleiðir alifisk.

Kommunurnar ikki koma undir hesi lógarkrøv, tá kommunur ikki framleiða t.d. alifisk. Men ábyrgdin, viðv. vatngóðskuni í áum, og hvar og hvussu kloakkútlát verða løgd, liggur tó hjá kommunum.

Spillivatnskunngerðin– krøv til kommununa
Lógargrundarlagið hjá kommununum í mun til spillivatn er Kunngerð nr. 11 frá sept. 2009 um spillivatn. Her er m.a. ásett, at kommunurnar skulu lata Umhvørvisstovuni lidnar spillivatnsætlanir seinast 1. jan. 2011 og at spillivatnsskipanin í kommununi er liðug innan 1. jan. 2015.

Krøvini til lidnu spillivatnsskipanina síggjast í § 8- 13 í kunngerðini. T.d. er nevnt, at ikki er loyvt at leiða kloakkir út í aliøkjum.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Kommunurnar fylgja galdandi lóggávu á økinum og arbeitt verður í løtuni við at leggja seinastu hond á spillivatnsætlanirnar, samstundis sum kommunurnar eisini eru í gongd við sjálvt arbeiðið.

Fyritøkan og kommunan
Krøvini, ið vera sett fyritøkum sambært matvørulógini, ávirkar ikki beinleiðis skyldum kommununar sambært spillivatnskunngerðini. Her er ásett, at kommunala spillivatnsarbeiðið skal verða liðugt í 2015.

Løgliga er skylda kommununnar, tí ikki annað enn at fylgja galdandi reglum um stýring av kommunalum spillivatni.

Tá hettar er sagt ber til fyritøkum at heita á kommununa, um at raðfesta serlig økir av spillivatnsarbeiðinum frammarlaga ella at flyta kloakkútlát. Síðan er tað upp til kommununa at raðfesta í spillivatnsætlanini, nær arbeiðið verður gjørt í tíðarskeiðnum fram til 2015.

Viðmerkjast skal tó, at slík arbeiðir eru kostnaðarmikil hjá kommununum og væntast kann tí, at hesi verða raðfest yvir fleiri fíggjarár.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo